*»If we cannot end now our differences, at least we can help make the world safe for diversity. For, in the final analysis, our most common link is that we all inhabit this planet. We all breathe the same air. We all cherish our children's future. And we are all mortal«.*

John F. Kennedy í talu við American University, Washington D.C. juni 1963

Ein av nýggjaru bókunum, »Bloody Treason« hjá Noel Twyman, viðger alla søguna frá byrjan av og upp til útkomuna (1997). Bókin leggur fyri dagin eina vælumtókta teori um, hvussu og hvør myrdi Kennedy.

Flestu teoriir hava mafiuna inni í myndini, so ella so, og har finna vit eisini CIA. Somuleiðis tykist fyrrverandi FBI-ovastin, James Edgar Hoover, hava ein framstandandi leiklut. Og allir tríggir felagsskapir tykjast eisini hava góð motiv fyri at beina John Kennedy av vegnum.

Innrásin í Svínavíkini í 1961 er í miðdeplinum. Hetta var ein ætlan hjá CIA, sum Kennedy arvaði eftir Eisenhower-stjórnini, og Kennedy gav CIA grønt ljós við teirri treyt, at amerikanskir hermenn ikki beinleiðis luttóku í innrásini.

Tað vísti seg skjótt, at innrásin als ikki gekk sum ætlað, tí deils fóru cubansku hermenninir ikki í part við eksilcubanarunum, sum gjørdu innrás, og deils gjørdu teir landgongd í einum sumpumráði ið gjørdi, at innrásmenninir vóru reinar skjótiskivur.

CIA bað forsetan um hjálp frá flogvápninum, men Kennedy stóð fast við sítt. Úrslitið var, at teir, sum ikki vórðu dripnir, vórðu tiknir fangar.

Alment tók Kennedy ábyrgdina á seg, men innan stjórnina lovaði hann at spreingja CIA í »túsund petti«.

Eisini mafian var beisk. Hon hevði av øllum alvi hjálpt Kennedy í valinum í teirri vón og trúgv, at hann fór at vinna teimum gevandi casinoini á Cuba aftur úr klórnum á Castro. Í staðin fór Kennedy við yngra bróðrinum, Bobby (Robert) sum løgmálaráðharra, undir størstu jagstranina av skipaðum kriminaliteti í amerikanskari søgu. Eitt nú fekk hann Sam Giancana, mafiabossin í Chicago, útvístan úr USA.

At enda var tað James Edgar Hoover, sum eisini hevði áhuga í, at fáa Kennedy burtur úr Hvítu Húsunum. Tí hóast hann hevði klípur á Kennedy-brøðrunum, so hevði John Kennedy í kvittanum at seta Hoover frá, tá hann (Kennedy) tók við seinna skeiðnum sum forseti.

So allir tríggir felagsskapir høvdu einki at vinna og nógv at tapa, um Kennedy helt fram í Hvítu Húsunum. Og í roynd og veru kundu teir síggja fram ímóti í ringasta føri 24 árum við Kennedy í Hvítu Húsunum.

Í dag vita vit, at tað bert gjørdist til 1000 dagar tilsamans. Tað syrgdi Shiran Shiran (ella var tað hann?) fyri á Hotel Ambassador í Los Angeles 5. juni 1968, meðan Teddy (Edward) sjálvur syrgdi fyri sínari lagnu við Chappaquiddick brúnna 18. juli 1969, tá hann rendi bil sín út av brúnni, nakað, sum kostaði 29 ára gomlu Mary Jo Kopechne lívið (hetta inspireraði Simon & Garfunkel til hit teirra frá 1970 »Bridge Over Troubled Water«)

Ein seinni kanning, »House Select Committee on Assassinations«, varð sett í verk í 1977, eftir at almenningurin eins væl og politikarar vórðu á gosi, eftir at sonevndi Zapruter-filmurin á fyrsta sinni varð vístur í almennum amerikanskum sjónvarpi í 1975.

Kravið var, at hugt varð nærri at morðinum á Kennedy, forseta, og eisini ivasama morðinum á Martin Luther King, ið var skotin 4. apríl 1968 á balkongini á einum motelli í Memphis, Tennessee, eitt morð, sum ein James Earl Rey fekk skuldina fyri.

Tað vísti seg, at ein mikrofon hjá einum av motorsúklu politistunum hevði sett seg fasta, og hon upptók sjálvt morðið. Við hjálp av aukustiskum upptøkum á Dealey Plaza (økið í downtown í Dallas, har morðið fór fram) fann HSCA fram til, at skotin vórðu fýra skot og ikki trý. Eitt av skotunum var latið av framman fyri og til høgru fyri forsetabilin, altso á Grassy Knoll, so sum vitni høvdu sagt. Men hóast niðurstøðan var, at talan við 99,9% vissu var um eina samansvørjing, so gjørdi HSCA av, at Oswald var hin einasti, sum rakti Kennedy, og tí hin seki.

Við í frásøgnina um morðið á Kennedy hoyrir eisini, at langa leið frá morðstaðnum á Dealey Plaza varð ein løgreglumaður, J. D. Tippit, myrdur. Hann var eftir øllum at døma einasti løgreglumaður, sum ikki fekk boð um at luttaka í kanningararbeiðinum í sambandi við forsetamorðið. Tvørtur ímóti fekk hann boð um at halda seg í friðarliga íbúðarøkinum, Oak Cliff, og »vera til reiðar, um nakað skuldi hent«.

Hetta morðið varð eisini tilskrivað Lee Harvey Oswald, men eisini her hevði Warren-nevndin sínar trupulleikar við at fáa Oswald at passa til prógvini – so teir passaðu prógvini til Oswald, so sum Mark Lane og aðrir konspiratoristar vilja verða við.



*Einasti Secret Service-agentur, sum reageraði upp á skotini, var Clint Hill. Hann leyp av »follow-up«-bilinum og rann fram til forsetabilin. Á myndini er hann komin upp á forsetabilin, har hann trýstir Jacqueline Kennedy niður í setrið aftur og leggur seg oman á forsetaparið, fyri at verja tey ímóti fleiri skotum*


SOSIALURIN

JOHN F. KENNEDY FORSETI MYRDUR Í GJÁRKVØLDIÐ

Veiðutjóvarnir dømdir

***Sosialurin bar tíðindini um morðið á Kennedy forseta longu dagin eftir***

Keldur:
Presidents Commission on the Assassination of President John F. Kennedy
Rush to Judgement, eftir Mark Lane
High Treason 2, eftir Harrison Edward Livingstone
Bloody Treason, eftir Noel Twyman
Best Evidence, eftir David Lifton

## Hendingagongdin

John Fitzgerald Kenedy varð skotin fríggjadagin 22. desember 1963 klokkan 12.30 á Elm Street á Dealey Plaza í downtown Dallas, Texas.

Tveir tímar seinni var Lee Harvey Oswald handtikin í Texas Theatre, har hann hevði snýkt seg inn at hyggja at filmunum *Cry of Battle* og *War is Hell*.

Hóast hann var avhoyrdur fleiri ferðir millum klokkan 14.30 fríggjadagin til sunnumorgun klokkan 11.21, tá hann fastur í hondjørnum við Jim Leavelle, detektiv, varð skotin og myrdur av Jack Ruby, so finst hvørki bandupptøka ella niðurskrivað notatir av hesum avhoyringum.

Lee Harvey Oswald var sagdur deyður at vera snøggliga 48 tímar og sjey minuttir eftir, at John Fitzgerald Kennedy varð sagdur deyður at vera á júst sama borði í Trauma Room One á Parkland Memorial Hospital.

Jack Ruby bønaði og bað Warren-nevndina um at taka hann til Washington at vitna, tí »her (í Dallas) fáa tit aldrin sannleikan at vita frá mær«. Warren-nevndin noktaði.

Jack Ruby doyði í fongslinum í Dallas av krabbameini í 1967.

Ein slík grein er alt ov stutt at greiða frá málinum um Kennedy-morðið, tí tað eru so nógvar síður í málinum. Men fyri tey, sum eru áhugað í málinum, kann eg upplýsa, at um tit fara inn á t.d. amazon og leita eftir »kennedy assassination« koma í hundrað tali av áhugaverdum bókum fram. Eisini ber til at »googla« við somu leitiorðum.